KVÍVIKAR KOMMUNA
FRAMMI Í GERÐI 1
FO-340 KVÍVIK

Argir hin 28. juni 2019
Málsnr.: 18/00167- 38
Málsviðgeri: Maria Gunnleivsdóttir Hansen

**Góðkenning av umhvørvisárinsmeting í sambandi við vatntøku í Stórá og Breiðá (Kvívík) til elframleiðslu**

Umhvørvisstovan góðkennir hervið, sambært § 16, stk. 1 í elveitingarlógini[1], umhvørvisárinsmetingina hjá Kvívíkar kommunu fyri vatntøku í Stórá og Breiðá til elframleiðslu.

Miniorkuverkið við dagstovnin við Stórá (190 kW, kota 18) fer at vinna orku úr vatni tikið úr Stórá og Breiðá (á leið 230 m hædd). Sí mynd í fylgiskjali. Teinurin frá vatninntakinum í Stórá til orkuverkið er á leið 1,4 km. Teinurin frá vatninntakinum í Breiðá og oman á sjógv er á leið 1,7 km. Av tí, at vatn úr Breiðá verður leitt yvir í orkuverkið og haðani út í ánna, fer Stórá at vera størri frá orkuverkinum og oman á sjógv.

Kvívíkar kommuna metir, at einar 250 dagar um ári renna í miðal 400 l/s í báðum áunum. Vatnturbinan tekur 125 l/s. Ætlanin er, at orkuverkið íalt skal taka í mesta lagi á leið 70 l/s úr Breiðá og á leið 55 l/s úr Stórá, t.v.s. í mesta lagi 125 l/s. Vatntøkan kann sjálvvirkandi og í seks trinum stillast niður til lægsta trin, sum er 21 l/s (12 l/s úr Breiðá og 9 l/s úr Stórá). Vatninntakið í Breiðá verður steðgað, tá vatntøkan er 24 l/s. Vatninntakið í Stórá verður steðgað, tá vatntøkan er 18 l/s.

Sambært § 16, stk. 1 í elveitingarlógini skal, áðrenn loyvi kann verða givið til elframleiðslu, verða gjørd ein umhvørvisárinsmeting, og skal henda verða góðkend av Umhvørvisstovuni.

Endamálið við umhvørvisárinsmetingini er at tryggja, at ávirkanin av verkætlanini á umhvørvið er væl lýst, so at sleppast skal undan óvæntaðum avleiðingum.

*Umsóknin*
Upprunaliga umsóknin hjá Kvívíkar kommunu um góðkenning av umhvørvisárinsmeting varð móttikin 23. februar 2018. Síðani hevur kommuna eftir áheitan latið Umhvørvisstovuni fleiri ískoytisupplýsingar. Tann 8. mai 2019 lat kommunan Umhvørvisstovuni ta endaligu umhvørvisárinsmetingina.

[1] Løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2012.

*Hoyring*
Árinsmetingin varð løgd til almenna hoyring 9. - 30. mai 2019. Umhvørvisstovan fekk ongar viðmerkingar.

*Treytir*
Góðkenningin er treytað av, at kommunan fylgir treytunum niðanfyri og at ætlanin annars verður framd sum lýst í móttikna tilfarinum.

1) *Tøkan av vatni úr Breiðá skal steðga tá vatnið, sum rennur fram við inntakinum fer undir á leið 24 l/s.*
2) *Tøkan av vatni úr Stórá skal steðga tá vatnið, sum rennur fram við inntakinum fer undir á leið 18 l/s.*

Hendan góðkenningin tekur ikki støðu til, um neyðugt er við øðrum góðkenningum sambært aðrari lóggávu.

*Eftirlit og gjald.*
Umhvørvisstovan hevur eftirlit við at treytir í hesi góðkenning verða hildnar. Rokning fyri málsviðgerð, sambært í kunngerð um gjøld[2] verður send tá málsviðgerðin er liðug.

*Kæruvegleiðing*
Henda avgerð kann kærast til Heilsu- og innlendismálaráðið innan 4 vikur. Kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum síðani sendur hana til ráðið saman við tilfarinum í málinum.

Vinarliga



Maria Gunnleivsdóttir Hansen

**Avrit:** Elveitingareftirlitið (Umhvørvisstovan), 160 Argir

[2] Kunngerð nr. 102 frá 22. oktober 2012 um gjøld hjá Umhvørvisstovuni fyri umsiting og eftirlit sambært lóggávuni á umhvørvisøkinum

**FYLGISKJAL**

Skitsa gjørd út frá umsóknartilfarinum.

